### Silvurbrúdleyp

11. juli høvdu hjúnini Elsuba og Petur Petersen á Viðareiði silvurbrúdleyp. Dagurin varð hildin í Barcelona, Spania.

Leygardagin 15. juli halda Petsy og Thormóð Nielsen, Skopun, silvurbrúdleyp. Veitslan verður í Samljóð kl. 19.00.

### Brúdleyp

Í dag 14. juli giftast í Eiðis kirkju Nina Durhuus, Eiði og Rógvi Fossadal, Haldarsvík. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Eiði kl. 18.00.

Leygardagin 15. juli kl. 15.00 giftast í Betesta í Klaksvík, Kristina Hallursdóttir Laksáfoss, Klaksvík og Filip Jónson Eliasen, Tórshavn. Veitslan fyri innbodnum verður í bygdarhúsinum í Leirvík kl. 19.00.

Leygardagin 15. juli kl. 15.00 giftast í Nordfjoreid kirkju í Noregi, Heidi Beate Erviksæter og Thomas Poul Reines Hals, sonur Elsebeth Reines úr Fuglafirði og Per Eirik Hals. Brúdleypsadr.: Erviksæter, 6776 Skjølsdalen, Noreg.

Leygarmorgunin 15. juli kl. 9.00 giftast í Havnar kirkju Katrin J. Lindberg og Rúni Hansen, Tórshavn. Morgunmatur verður fyri innbodnum í Listaskálanum millum kl. 10.00-12.00.

Leygardagin 15. juli kl. 14.00 giftast í Býráðshølinum í Tórshavn, Durita Müller, Tórshavn og Arnfinn Gudjónsson, Klaks-vík. Veitslan verður í Pálsstovu kl. 18.00.

Leygardagin kl. 14.00 giftast í Siloa í Fuglafirði, Daysie Johannesen, Fuglafjørður og Róðin Thomsen, Hvalba. Dagurin verður hildin fyri innbodnum á Hotel Hafnia.

### 70 ár

Mánadagin 17. juli verður Ingrid Mikkelsen, Vágur, 70 ár. Dagurin verður hildin leygardagin 15. juli kl. 19.00 í Billiardhúsinum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

### 75 ár

Sunnudagin 16. juli verður Tróndur Eysturstein, Leirvík, 75 ár. Dagurin verður hildin heima frá kl. 17.00.

### 80 ár

Leygardagin 15. juli verður Poula Mohr, Fuglafjørður, 80 ár. Dagurin verður hildin heima millum kl. 10.00-15.00.

### 90 ár

Mánadagin 17. juli verður Alfred Magnussen, Vágur, 90 ár. Tey, ið vilja heilsa uppá Alfred, eru vælkomin millum kl. 14.00 og 20.00.

## Dagurin

**15. juli. Ápostlarnir skiljast**. Miðaldar søgn sigur frá, at á hesum degi fóru ápostlarnir hvør í sína ætt at gera eftir boðum Jesu (matt. 28, 19). Tummas og Bartolomeus fóru eystureftir, Símun og Matteus suðureftir, Filippus og Judas Taddeus norðureftir og hinir lærusveinarnir ymsar vegir. Søgan sigur eisini, at áðrenn teir skiltust, settu teir saman ápostólsku trúarjáttanina.

**16. juli. Súsanna**. Í apokrýfisku bókunum verður sagt frá, at Súsanna, kona Jójakims í Bábel, varð løgd undir ótrúskap, men varð bjargað av profetinum Dánjali. Súsonnuvísa varð kvøðin í brúardansi í Føroyum. Navnið er hebráiskt og merkir *lilja.*

**17. juli. Aleksius**, deyður umleið ár 430. Hann var sonur ein rómverskan senator, men fór ungur heimanífrá og livdi sum biddari og kristin prædikumaður í 17 ár. Hann kom heim aftur og livdi onnur 17 ár sum biddari fyri durunum hjá pápa sínum. Eftir deyðan varð hann skírdur halgimenni. Hann liggur jarðaður undir Pæturskirkjuni. Navnið er ein stytting av Alexandros, ið merkir *verndarmaður.*

# Birgar Johannessen 60 ár



Sunnudagin 16. juli fyllir Birgar Johannessen í Havn 60 ár.

Birgar er havnarmaður við stórum H, ið eftir hondini er vorðin ein slags magistari í havnarsøgu.

Navnið Birgar verður ofta sett í samband við tónleikasendingar í útvarpinum og stórar framsýningar við gomlum myndum og annars øllum frá Dandytyggigummi til Valorpetroleumsovnar. Hann samlar t.d. upp á modellbilar, grammofonplátur, plakatir og nógv ymiskt annað.

Eitt sum eyðkennir tað sum Birgar fæst við, er at tað hevur so stóran áhuga millum fólk. Á hansara framsýningum hava tey vitjandi ofta hug at gloyma seg sjálvi burtur í tí tey síggja, tí har er so nógv ymiskt, sum fær tey at minnast aftur á farnar dagar.

Nógv av tí sum hevur verið frammi á hesum framsýningum kemur skjótt út í eini havnarleksikon undir heitinum “Tórshavnar alfrøði”. Talan verður eitt stórt uppslagsverk við øllum upplýsingum um alt sum hevur gingið fyri seg í Havnini frá 1900 til 1970. Har fer at bera til at leita fram t.d. hvør hevði ta fyrstu barberstovuna í havn, hvar hon var og síðan fylgja søguni hjá øllum barberstovunum fram til 70-ini. Somuleiðis verður gjørt við t.d. handlum, kioskum, bakarum, ítróttarfeløgum, samkomum og stovnum av ymiskum slagi.

Slíkt arbeiði er sera tíðarog orkukrevjandi. Men við tí ídni og ágrýtni sum Birgar sýnir og við sínum væl skipaða og greiða arbeiðsmáta, er einki at ivast í, at hetta verður ein fongur hjá Havnini, serliga av tí at tilfarið grýpur inn í alla mentanina hjá býnum. Birgar hevur savnað nógvar túsund myndir, so tað verður eitt sera spennandi uppslagsverk.

Birgar er eisini fótbóltsáhugaður. Í enskum fótbólti er tað Liverpool og í føroyskum fótbólti er tað B36, sum standa hansara hjarta næst. Til nógv av tiltøkunum hann hevur skipað fyri, fer ágóðin til ungdómsarbeiði hjá B36. Hann er eisini eitt av trúføstu viðhaldsfólkunum hjá felagnum.

Í samband við fótbólt kunnu vit eisini nevna, at tað var Birgar sum í sínum arbeiði við at leita í gomlum bløðum á Landsbókasavninum fann fram til sjálvan dagin í 1904, tá Havnar Bóltfelag varð stovnað.

Tað er einki dulsmál, at Birgar hevur ein serligan tokka til 60-ini. Hann sigur, at hetta tíggjuáraskeiðið fer altíð at vera nakað heilt serligt.

Birgar er útbúgvin skrivstovumaður og koyrdi í fleiri ár hýruvogn í Auto. Frá 1985 til fyri nøkrum árum síðan arbeiddi hann sum skrivstovumaður og bókhaldari hjá Smyril Line.

Hann er yngst av teimum 7 børnunum hjá Jacobinu, f. Christiansen, av Signabø, og Fritleif Johannesen í Havn. Birgar búði tað mesta av sínum barnaárum yvir í Ovaru Lon, har hann flutti sum 3 ára gamal.

Systkini hjá Birgari eru: Petur, sum doyði fyrr í ár, Karl, sum búði í Íslandi og doyði í 1993, Brynhild Rasmussen, Emmely Forná, sum doyði í fjør, Iris Petersen og Leivur Johannessen.

Birgar er giftur Elsu, f. Pállson úr Havn. Tey búgva á Norðasta Horni og eiga trý børn: Bjørg, Teitur og Marin, sum øll búgva í høvuðsstaðnum. Elsa og Birgar eiga 7 barnabørn, 6 gentur og ein drong.

Vit á Sosialinum hava stóra frægd av at samstarva við Birgar og ynskja honum hjartaliga tillukku við føðingardegnum og góða eydnu við Tórshavnar alfrøði, sum hann hevur lagt so nógva orku í.

Føðingardagin heldur Birgar saman við familjuni.

**m.**

Myndafólk vitjaðu:

# Tóku 50 túsund myndir í Føroyum



*Jørgen Lützen (uttast til vinstru) saman við teimum 18 donsku yrkismyndafólkunum. Maðurin í ljósum klæðum (nr. 4 frá høgru) er Lars Grunvald, hann er beiggi sjónleikaran Morten Grunvald, sum m.a. er kendur frá Olsen Banda filmunum*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í døgunum 26.-30. juni vitjaðu 18 donsk yrkismyndafólk í Føroyum.

Tey eru limir í Dansk Fotografisk Forening og hava fingið stuðul til at kanna kunst á ein annarleiðis hátt. Hesi myndafólkini hava fyrr verið í øðrum londum í somu ørindum, og hesaferð valdu tey so at koma til Føroyar.

Tað vóru føroysku myndamenninir Per á Hædd og Jørgen Lützen, sum skipaðu fyri ferðini. Jørgen Lützen sigur, at myndafólkini vóru so bergtikin av vakarleikanum í Føroyum, at fleiri av teimum ætla sær at koma aftur hendan vegin. Hann sigur, at tey tóku umleið 50 túsund myndir, meðan tey vóru her.

Myndafólkini vitjaðu nógvastaðni í Føroyum og vóru sera hugtikin av listini í føroysku kirkjunum.